Tryggingareftirlitið

Tórshavn 9. mai 2019
Journalnr.: 18/00353-9

Hoyringarskriv

Uppskot til kunngerð um endurtryggingarvirksemi og samtryggingarvirksemi

Tryggingareftirlitið er vorðið varugt við, at ein rað av *sertryggingum*, undir hesum lógarkravdar tryggingar, verða teknaðar í útlendskum tryggingarfeløgum, ið ikki hava loyvi at reka virksemi í Føroyum.

Til tess at meta um hetta stendst av, at nakrir ávísir føroyskir tryggingartakarar hava ein veruligan tryggingartørv, ið annars ikki vildi verið nøktaður, hevur Tryggingareftirlitið kannað viðurskiftini nærri.

Tryggingareftirlitið er av teirri fatan, at høvuðsorsøkin til hetta er, at hesar sertryggingar ikki verða bjóðaðar út av teimum føroysku, íslendsku ella donsku tryggingarfeløgunum, ið lógliga kunnu reka virksemi í Føroyum.

Talan er um hesar sertryggingar:

1) Skrokktrygging av flogførum
2) Ábyrgdartrygging fyri flogfør
3) Ábyrgdartrygging fyri skip á 300 bruttotons ella meir, sonevnd P & I trygging (Protection & Indemnity)
4) Ábyrgdartrygging fyri flogvøllir (Airport Liability Insurance)
5) Heilsutrygging (Health Insurance)
6) Ábyrgdartrygging fyri nevnd og stjórn (Directors and Officers Liability)
7) Professionel ábyrgdartrygging (Errors & Omissions)
8) Kriminalitets- og fíggjarsvikstrygging, fólkarán, avnoyðsla og cyberkriminalitetur (Financial Fidelity)

Til tess at eftirlíka einum aktuellum tryggingartøvi í Føroyum og sum liður í at gera viðurskiftini lóglig, hevur Tryggingareftirlitið við heimild í § 3 í tryggingarlógini gjørt uppskot til nýggja kunngerð um endurtrygging og samtrygging, sí viðfesta skjal.

Sambært uppskotinum til kunngerð verður møguligt at dekka tær undir pkt. 5-8 nevndu sertryggingar við samtrygging, um nakrar nærri ásettar treytir eru loknar. Í kunngerðini verða eisini ásettar nærri reglur um tryggingarligar avsetingar, hagfrøðiligar upplýsingar og um endurtryggingarvirksemi.

Til tess at handfara tær undir pkt. 1-4 nevndu sertryggingar ætlar Tryggingareftirlitið at gera uppskot til broyting í tryggingarlógini, ið loyvir, at trygginarfeløg í ES/EBS-londum kunnu tekna tær undir pkt. 1-4 nevndu sertryggingar, hóast Føroyar ikki hava gjørt nakra sínámillum avtalu við ES/EBS. Harumframt verður latið upp fyri vinnuligari miðlan av hesum sertryggingum.

Nýggja kunngerðin verður eftir ætlan sett í gildi tann 1. juni 2019.

Møguligar viðmerkingar til uppskotið til kunngerð skulu vera Tryggingareftirlitinum í hendi í seinasta lagi 28. mai 2019.

Viðmerkingar og spurningar kunnu sendast við telduposti til gn@tryggingareftirlitid.fo ella til Tryggingareftirlitið stílað til Gudmundur Effersøe Nónstein, Skálatrøð 20, Postboks 73, FO-110 Tórshavn.

Vinarliga

Jógvan Thomsen

Stjóri

/Gudmundur Effersøe Nónstein

Dansk oversættelse

Høring af bekendtgørelse om genforsikringsvirksomhed og coassurancevirksomhed

Forsikringstilsynet er blevet opmærksomt på, at der er en række specialforsikringer, herunder lovpligtige forsikringer, som bliver tegnet i udenlandske forsikringsselskaber, der ikke har tilladelse til at drive virksomhed på Færøerne.

For at vurdere om dette kan skyldes, at nogle nærmere bestemte færøske forsikringstagere har et reelt forsikringsbehov, som ellers ikke ville blive dækket, har Forsikringstilsynet undersøgt forholdene nærmere.

Det er Forsikringstilsynets opfattelse, at dette hovedsageligt skyldes at disse specialforsikringer ikke udbydes på Færøerne af de færøske, islandske eller danske forsikringsselskaber, som lovligt kan drive virksomhed på Færøerne.

Der er tale om følgende specialforsikringer:

1) Kaskoforsikring for luftfartøjer
2) Ansvarsforsikring for luftfartøjer
3) Ansvarsforsikring for skibe med en bruttotonnage på 300 eller derover - P & I-forsikring (Protection & Indemnity)
4) Ansvarsforsikring for lufthavne (Airport Liability Insurance)
5) Sundhedsforsikring (Health Insurance)
6) Ansvarsforsikring for direktion og bestyrelse - D & O-forsikring (Directors and Officers Liability)
7) Professionel ansvarsforsikring – E & O-forsikring (Errors & Omissions)
8) Kriminalitets- og underslæbsforsikring, kidnapning, afpresning og cyberkriminalitet (Financial Fidelity)

For at imødekomme et aktuelt forsikringsbehov på Færøerne og som led i lovliggørelse af forholdene, har Forsikringstilsynet med hjemmel i forsikringsloven § 3 udarbejdet udkast til ny bekendtgørelse om genforsikring og coassurance, se vedhæftede.

Ifølge udkastet til bekendtgørelse vil de under pkt. 5-8 nævnte specialforsikringer kunne dækkes ved coassurance, såfremt nogle nærmere fastsatte betingelser er opfyldt. Der bliver også i bekendtgørelsen fastsat nærmere bestemmelser om forsikringsmæssige hensættelser, statistiske oplysninger og om genforsikringsvirksomhed.

For at kunne håndtere de under pkt. 1-4 nævnte specialforsikringer påtænker Forsikringstilsynet at udarbejde et forslag til ændring af forsikringsloven, som tillader, at forsikringsselskaber i EU/EØS-lande kan tegne de under pkt. 1-4 nævnte specialforsikringer, selv om Færøerne ikke har indgået en gensidighedsaftale med EU/EØS. Ligeledes vil der blive åbnet op for erhvervsmæssig formidling af disse specialforsikringer.

Bekendtgørelsen forventes at træde i kraft den 1. juni 2019.

Forsikringstilsynet skal anmode om eventuelle bemærkninger til udkastet til bekendtgørelse om genforsikringsvirksomhed og coassurancevirksomhed senest den 28. maj 2019.

Bemærkninger og spørgsmål kan sendes pr. e-mail til gn@tryggingareftirlitid.fo eller pr. post til Forsikringstilsynet, Skálatrøð 20, postboks 73, FO-110 Tórshavn, Att. Gudmundur Effersøe Nónstein.

Vinarliga

Jógvan Thomsen

Stjóri

/Gudmundur Effersøe Nónstein